Blað at taka úr

# Úrslit sum tala

Fýra ár við Javnaðarflokkinum á Fólkatingi hava givið nógv úrslit.

Tað er best fyri Føroyar, at arbeiðið heldur fram.


Aksel V. Johannesen
Hoyvík


Sigga Ó. Joensen
Fuglafjørður


Kristoffur Gaardlykke
Miðvágur


Bjørg Dam
Tórshavn


Kristianna W. Poulsen
Hoyvík


Bjarni Hammer
Tvøroyri


Gudny D. Hentze
Sandur


Artur Johansen
Strendur


Henrik Old
Vágur


Rigmor Dam
Tórshavn


Sjúrður Skaale
Tórshavn


Eyðgunn Samuelsen
Klaksvík



# Full tíð fyri allar føroyingar

**Lyftini, sum góvu Javnaðarflokkurin sess á Fólkatingi í 2011, vóru púra greið. Vit lovaðu at:**

- Røkja starvið fulla tíð.
- Umboða allar føroyingar.
- Leggja dent á ítøkilig úrslit heldur enn partapolitiska markering.
- Samstarva við øll, sum vit kundu náa úrslitum saman við.
- Knýta útisetar at føroyska samfelagnum.
- Føra fram føroysk sjónarmið á øllum tøkum pallum.
- Ikki draga føroyskar ósemjur til Danmarkar.
- Siga nei til bæði undirbrotligheit og konfrontatión, men fara í dialog við danskar myndugleikar.

Síðani er hvør dagur brúktur til at fremja hetta í verki. Og tað hevur gagnað føroyska samfelagnum.



*Fyri fyrstu ferð hevur verið samstarv millum allar norðuratlantisku fólkatingslimirnar*

# Bara samstarv **skapar úrslit**



Sjúrður Skaale fekk sessin á Fólkatingi í 2011. Men ein politikari kann einki gera einsamallur. Alt arbeiðið er gjørt í samráð við leiðslu Javnaðarfloksins. Harumframt hava vit samstarvað við:

- Føroyskar politiskar myndugleikar.
- Føroyskt vinnulív.
- Føroyskt mentanarlív.
- Almennar stovnar í Føroyum.
- Hinar norðuratlantisku fólkatingslimirnar.
- Norðurlendskar politikarar
- Danskar politiskar myndugleikar.

Øll úrslitini eru sprottin úr hesum samstarvi. Tað fer at halda fram, um Javnaðarflokkurin fær ein sess á valinum hesaferð.

Endamálið er ikki at sita á Fólkatingi og veittra við tí partapolitiska flagginum.

Endamálið er at fáa úrslit.









# Greið krøv og greið umboðan
# í makrel- og sildastríðnum



NYHEDER TV RADIO

Nyhedsoverblik | Politik | Sport | Kultur | Viden | Lev Nu | Regionalt

31. JUL. 2013 KL. 15:12

## Regeringen under pres for at støtte Færøerne

Regeringen har risikeret at miste parlamentarisk støtte fra færøsk folketingsmedlem.

PRINT

DEL ARTIKLEN: MAIL TWITTER FACEBOOK

Af Morten Frandsen

EU har i dag vedtaget at indføre sanktioner mod Færøerne, så færøske silde- og makrelfiskere ikke må sælge deres fisk i EU's havne, herunder i Danmark.

Danmark stemte imod sanktionerne. Ifølge Fødevareministeren fordi Danmark tager "udstrakt hensyn" til Rigsfællesskabet med Færøerne. Men nu viser det sig, at regeringen også har haft en parlamentarisk trussel hængende over hovedet i sagen.

For det færøske folketingsmedlem Sjurour Skaale har truet med at trække sin støtte til den danske regering, hvis regeringen havde stemt for sanktionerne.

- Hvis Danmark havde stemt ja i dag, så ville jeg ikke støtte regeringen længere. Det er klart, siger Sjurour Skaale fra det færøske socialdemokrati til DR Nyheder.

**Fuldstændigt umuligt at støtte**

Han forklarer, at han gjorde dette klart for de relevante ministre kort tid efter folketingsvalget, fordi der allerede dengang var optræk til, at der kunne opstå stridigheder med EU om fiskekvoterne.

Javnaðarflokkurin setti sum greiða treyt fyri at stuðla donsku stjórnini, at hennara støðutakan í makrel- og sildastríðnum var nøktandi fyri Føroyar.

Onkuntíð stóð hart á, og í einum føri atkvøddu vit ímóti stjórnini. Hevði Venstre ikki bjargað henni tá, hevði stjórnin komið í minniluta.

Eftir tað var samstarvið í lagi.

Vit umboðaðu eisini føroysku sjónarmiðini í miðlunum. Tað varð gjørt í samráð við føroyskar myndugleikar til tess at tryggja, at Føroyar talaðu við einari rødd.





EKSTRA BLADET

DET GÅR I FISK

**Makrellen kan vælte Helle**

To grønlændere og en færing truer med at trække støtten til regeringen

Fængslet efter narkofund

10

Helle Thorning-Schmidts flertal vakler.

Sjurdur Skaale

EU truer med boykot






# Nøkur **úrslit**

## Úrslitini eru mong og góð. Her eru nøkur teirra.

### 10 milliónir til FarGen

Í samráð við viðkomandi partar gjørdu vit í 2014 semju við stjórnina um, at FarGen fær 10 milliónir. Endamálið er bæði at basa sjúkum, at menna føroyska gransking, og at skapa arbeiðspláss og inntøkur í Føroyum.

FARGEN
FAROE GENOME PROJECT

### Tvær milliónir til fornminni í Porkeri

Aldargomlu húsini í Eystrum í Porkeri eru eitt serstakt fornminni. Í mars 2015 gjørdu vit semju um, at tey kunnu verða endurreist í upprunaligum sniði fyri tvær milliónir. Endamálini eru varðveitslan í sjálvum sær, at menna ferðavinnuna – og at fólk skulu kunna læna húsini í styttri tíðarskeið.



### Stórt endurgjald til føroyingar

Inntil 2011 rindaðu nógvir føroyingar av órøttum 8% í donskum arbeiðsmarknaðargjaldi. Hóast málið var fyrnað fingu vit ígjøgnum, at mistakið mátti rættast. Fleiri fingu stórt endurgjald.



### Veitingar til føroyingar í Danmark

Undanfarna danska stjórn broytti lógina, so føroyingar mistu rættin til fleiri veitingar. Vit tóku málið upp, og frá 1. januar 2013 fingu føroyingar hesi rættindi aftur. Í 2014 eydnaðist eisini at tryggja teimum, sum mistu veitingarnar í eitt ár, fult endurgjald.



### Samstarv um føroyskan film

Saman við Klippfisk fingu vit í lag samstarv millum Dansk Filminstitut og føroysk filmfólk. Hetta hevur ment spírandi føroysku filmsmentanina. Vit hava eisini í samráð við føroysk filmfólk latið gera stórt álit um føroyskan filmpolitikk og filmhús.



### Føroysk bankatrygd

Fíggjarmarknaðurin í Danmark skal umleggjast, so teir størstu bankarnir ikki skulu kunna fara á heysin. Í samstarvi við Landsstýrið fingu vit í lag avtalu um, at umleggingin skal kunna fevna um føroysku bankarnar.



## ✓ Markaforðingar beindar burtur

Í mai 2014 var eitt uppskot samtykt um at beina burtur forðingar, sum gera samskifti millum Føroyar og Danmark tvørligt. Allir fólkatingslimirnir úr Føroyum og Grønlandi løgdu tað fram. Nakrar forðingar eru longu burtur, og vit arbeiða víðari við øðrum.



## ✓ Tvískattasáttmálar

Vantandi tvískattasáttmálar er ein trupulleiki fyri frálandavinnuna og skipaskrásetingina. Í samstarvi við føroysk reiðarí, fíggjarmálaráðið og danska skattamálaráðið gjørdu vit drúgva frágreiðing um, hvussu viðkomandi donsku sáttmálarnir kunna víðkast til eisini at fevna um Føroyar.



## ✓ Kirkjubíblian føroysk

Vit samstarvaðu við føroyskar myndugleikar um at fáa rættindini til føroysku kirkjubíbliuna flutt til Føroya.



## ✓ Tryggjað játtan til Norðurlandahúsið

Kreftir í Norðurlandaráðnum royna at skerja játtanina til Norðurlandahúsið munandi. Í samstarvi við leiðsluna í húsinum gjørdu vit alt fyri at steðga hesum - og tað eydnaðist. Eisini onnur føroysk umboð í ráðnum gjørdu sítt til, at ætlaða sparingin bleiv strikað.



## ✓ Avhoyringarútgerð til barnahús

Í 2013 royndu vit, í samráð við landsstýrið, at fáa fígging til serliga avhoyringarútgerð til nýggja barnahúsið. Tað eydnaðist.



## ✓ Betri saltfiskaframleiðsla

Eitt ES-forboð móti at nýta fosfat í saltfiskaframleiðslu var ein stórur vansi fyri føroyskar framleiðarar. Í samstarvi við føroyska vinnu, føroysku uttanríkistænastuna, donsku vinnuna og donsku stjórnina strongdu vit á at fáa forboðið strikað. Tað eydnaðist.



## ✓ Thorshavn til Tvøroyrar

Tá Ríkisumboðið vildi sleppa sær av við bátin Thorshavn var sannlíkt, at hann endaði uttanlands. Men vit hjálptu fólki á Tvøroyri at sannføra donsku stjórnina um, at báturin í staðin skuldi til Tvøroyrar fyri ein bíligan penga.

## Onnur úrslit, sum eru nádd saman við øðrum:

- ✓ Nýútbúnir føroyingar kunnu taka danskan arbeiðsloysisstuðul við til Føroya í tríggjar mánaðir.
- ✓ Norðurlendsk barnabókavirðisløn sett á stovn.
- ✓ Føroyingar eru javnsettir við danskar umsøkjarar í samband við upptøku á skúlaheim.
- ✓ Krav um at hava havt danskt á A-stigi fyri at søkja inn á donsk universitet er strikað.
- ✓ Vegleiðing og hjálp er veitt til ein hóp av einstaklingum.

## Óloyst mál

Tað skal ikki dyljast, at nøkur mál, ið vit hava arbeitt við – eisini mál, sum hava stóran týdning fyri nógv fólk – enn eru óloyst, nú valskeiðið endar. Ikki tí vit ikki hava gjørt okkara besta, men tí tað ikki hevur eydnast at broyta lógir og skipanir. Hesi mál verða tikin upp aftur, vinna vit sessin aftur.

# Nýggj **vitan**

**Fortreytin fyri at kunna taka rættar avgerðir er at hava rætta vitan. Tí hava vit fingið til vega nógva nýggja vitan um Føroyar og føroyingar.**

## Hvat vita danir um Føroyar?

Hvat halda og vita danir um Føroyar? Tað gjørdu vit eina kanning um - og hon gav okkum høvi til í donskum miðlum at afturvísa mest vanligu misskiljingini: Nevniliga at Føroyar eru ein fíggjarlig byrða fyri Danmark. Umrøðan hevði við sær, at ein portalur er skipaður, har danskir lærarar finna tilfar um Føroyar, og at eitt filmslið ger føroyskt tilfar til danska skúlan.




## Hvussu skatta vit í mun til onnur?

Í Føroyum taka vit nærum allan skatt inn sum lønarskatt. Kundu vit býtt skattabyrðuna øðrvísi? Hvørjar høvdu fylgjurnar verið? Og hvønn hugburð hava føroyingar til skatt? Hetta lýstu vit í kanningini "Tað, sum keisarans er".




## Ja til Evropa

Tað kann stundum vera ein fyrimunur at standa uttanfyri ES - men tað kann eisini gerast hættisligt. Hvørjar møguleikar hava vit? Og hvussu hava onnur smá lond skipað seg? Vit skrivaðu eina bók um hetta, og skipaðu fyri fleiri kjakfundum um evnið.




## Hvat dregur fólk til Føroya?

Umleið annarhvør føroyingur hevur búð í Danmark. Hvat er tað, sum dregur fólk burtur? Og hvat dregur tey heimaftur? Tað er neyðugt at vita í royndunum at styrkja tilflytingina. Og tað lýstu vit í kanningini "Hvat er tað, sum dregur".




## ES og føroysk fiskivinna

Størsta orsøkin til, at Føroyar sita so uttarlaga í ES-høpi, er fiskivinnupolitikkurin hjá ES. Men hvør er veruleikin um henda politikk? Og hvør hevði avleiðingin verið, um Føroyar blivu partur av honum? Tað lýstu vit í einum framhaldi av bókini um ES og Føroyar.




## Føroyskir fordómar um Føroyar

Í kjakinum um tilflyting verður ofta sagt, at fíggjarliga er lættari at búgva í Danmark enn í Føroyum. Men er tað so? Hvat eru fordómar og hvat er fakta í kjakinum um munin millum Føroyar og Danmark? Tað lýstu vit í kanningini: "Ása & Óli".




## Hvussu kann fiskivinnan skipast?

Í samráð við norska professaran Torbjørn Trondsen gjørdu vit stóra greining av føroysku fiskivinnuni, eins og hann gjørdi ítøkilig uppskot um ábøtur. Úrslitið bleiv rapportin "Fiskivinnan eftir 2018", sum fekk nógva umrøðu.




## Hvat nú um vit finna olju?

Vit skipaðu fyri stórum fundum um føroyska oljuvinnu - bæði millum útisetar og í Føroyum. Norska stjórnin, landsstýrið, føroyska vinnan og fakfeløg tóku lut. Seinni lótu vit gera ein bókling um hesa stóru avbjóðing (hann var tó ikki heilt liðugur, nú val bleiv skrivað út).



## Føroyingar uttan fyri norðurlond

Nógvir føroyingar lesa uttanfyri norðurlond. Hvat er sambandið millum hesi fólk og føroyska samfelagið? Og hvussu kann bøtast um tað? Tað lýstu vit í kanningini "Vit flyta ikki longur enn hini".




## Pensionistar sambært teirra egnu orðum

Tað er nógvur statistikkur um korini hjá eldri føroyingum. Vit gjørdu eina frágreiðing, har tey lýstu sína støðu við egnum orðum. Hon kallaðist "Vit klára okkum, so leingi vit eru tvey".



# Umboðan

## Vit hava umboða Føroyar allastaðni, har vit eru sloppin framat.



**FÓLKATINGSSALURIN .** Vit hava á virðiligan, men kontantan hátt umboðað Føroyar í orðaskiftinum á Fólkatingi. Tað hevur givið nógv endurljóð.



**MENTANARNÆTUR.** Saman við Sambandsflokkinum skipaðu vit fyri fleiri tiltøkum við føroyskari mentan og mati á Christiansborg. Á myndini er tað Johanne Schmidt Nielsen úr Eindarlistanum sum roynir "ólógligan" makrel úr Føroyum ☺.




**MIÐLAR.** Gjøgnum kronikkir, lesarabrøv og samrøður í donskum og øðrum miðlum er ljós støðugt varpað á Føroyar og føroysk sjónarmið.



**TILTØK Í FØROYSKU HÚSUNUM.** Vit hava lagt stóran dent á at røkja sambandið við føroyskar útisetar við tiltøkum í Keypmannahavn, Århus, Odense og Aalborg.



**OLJURÁÐSTEVNUR.** Stór oljuráðstevna var á Christiansborg. Umboð fyri norsku stjórnina, føroysku vinnuna og serfrøðingar tosaðu um ta avbjóðing, ið oljuvinnan hevur við sær. Tað var størsta tiltak, sum hevur verið á Christiansborg á føroyskum. Tiltakið bleiv endurtikið í Løkshøll í Runavík.



**VITJANIR ÚR FØROYUM.** Nógvir skúlaflokkar og aðrir bólkar hava vitjað á Christiansborg.




**NORÐURLANDARÁÐ.** Gjøgnum sessin í Norðurlandaráðnum fingu vit ein pall at føra fram føroysk sjónarmið víða um.



**ØLSMAKKING.** Ein dagin góvu vit dønum høvi at smakka øl frá Føroya Bjór og Okkara inni á Christiansborg.




**FØROYSK VINNA Á STØRSTA PALLIN.** Vit hava samskipað marknaðarføringina av føroyskum vinnulívi í sambandi við økta virksemið í arktiska økinum. Og í september hava vit fingið føroyskum vinnulívi pláss á stóra pallinum, tá heimsins størsta ráðstevna um arktis verður í Reykjavík



**FÓLKAFUNDIR.** Vit hava tikið lut á fólkafundum bæði í Føroyum og Danmark.

# Grundarlag

**Javnaðarflokkurin hevur gjørt hesar meginreglur fyri, hvussu fólkatingssessurin skal røkjast.**

## Visjón

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi er eitt virkið og virðiligt umboð fyri Føroyar og virkar fyri at gagna føroyskum einstaklingum, føroyskum vinnulívi , føroyskari mentan og føroyska samfelagnum sum heild allastaðni, har fólkatingssessurin gevur atgongd. Harumframt knýtir hann føroyskar útisetar tættari at føroyska samfelagnum.

## Missión

Til tess at fremja visiónina samstarvar Javnaðarflokkurin á Fólkatingi við føroyskar og danskar myndugleikar og við allar aðrar viðkomandi partar, bæði í Føroyum, Danmark og aðrastaðni. Millum føroyskar útisetar, danir og onnur fyriskipar og luttekur flokkurin í tiltøkum, sum kunnu kveikja áhugan fyri føroyska samfelagnum.

## Virði

Politisku virði Javnaðarfloksins eru tey somu á Fólkatingi sum í Føroyum, og allar yvirskipaðar avgerðir verða tiknar í samráð við leiðslu floksins. Men tað er føroyska samfelagið sum heild, ið vit umboðað á Fólkatingi - ikki bara Javnaðarflokkin. Tí mótarbeiða vit ikki politiska meirilutanum í Føroyum. Javnaðarflokkurin skal ikki draga innlendis føroyskar ósemjur niður á Fólkating.
Til tess at fáa sum mest burturúr teimum møguleikum, sum fólkatingssessurin gevur, loyvir Javnaðarflokkurin ikki tí persóni, sum situr á Fólkatingi, samstundis at sita á Løgtingi. Verður sami persónur valdur í bæði tingini, tekur næstvaldi sætið á fólkatingi, tá fyrstvaldi er á Løgtingi. Sama er galdandi, um fyrstvaldið tekur sæti í Landsstýrinum.
Starvsfólk Javnaðarfloksins á Fólkatingi verða einans sett sambært fakligum førleikum. Teirra uppgáva er at hjálpa við tí politiska arbeiðinum, at gera kanningar sum viðvíkja føroyska samfelagnum og at skipa fyri tiltøkum. Dentur verður lagdur á, at starvsfólkini arbeiða sjálvstøðugt, og at tey eisini sjálv kunnu skjóta upp, hvørji átøk skulu fremjast.

**Vel úrslit. Tað er best fyri Føroyar**



# Nógv fólk

Umframt fólkatingsmannin og eitt fulltíðar starvsfólk hava nógvir føroyskir studentar verið í starvi hjá Javnaðarflokkinum á fólkatingi. Harumframt hava nógv fólk gjørt verkætlanir fyri flokkin.

Øll hava arbeitt fakliga. Tað liggur eingin partapolitisk binding í tí at starvast hjá Javnaðarflokkinum á fólkatingi.

